# Barsilsskipan

## 49 Uppskot til løgtingslóg um barsilsskipan

A. Upprunauppskot
B. 1. viðgerð
C. Orðaskifti við 1. viðgerð
D. Nevndarskjøl
E. Álit
F. 2. viðgerð
G. Orðaskifti við 2. viðgerð
H. 3. viðgerð
I. Orðaskifti við 3. viðgerð

*Ár 2000, 21. desember, legði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi*

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um barsilsskipan**

**Partur I**
**Barsilsfarloyvi**

**Kapittul I**
***Barsilsfarloyvi***

**§ 1.** Kvinnuligur løntakari, hevur rætt til barsilsfarloyvi, orsakað av viðgongu og barnsburði, frá tí degi, mett verður, at 4 vikur eru eftir til barnsburð, ella frá tí løtu, hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur og/ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum, tó í fyrsta lagi frá tí degi, mett verður, at 13 vikur eru eftir til barnsburð. Eftir barnsburð hava foreldur, sum eru løntakarar, rætt til barsilsfarloyvi í tilsamans 24 vikur. Av teimum 24 vikunum kann faðir at barninum nýta tær 10 vikurnar eftir 14. viku eftir barnsburð. Rætturin til barsilsfarloyvi kann bert verða nýttur av einum av foreldrunum í senn.
*Stk. 2.* Umframt rættin eftir stk. 1 hevur faðir at barninum rætt til barsilsfarloyvi í upp til tvær vikur eftir barnsburð, ella eftir at barnið er komið heim, ella sambært avtalu við arbeiðsgevaran innan tær fyrstu 14 vikurnar eftir barnsburð.
*Stk. 3.* Kvinnuligur løntakari hevur rætt at vera frá arbeiði í sambandi við barnakonukanningar, tá hesar skulu fara fram í arbeiðstíðini.

***Ættleiðing***

**§ 2**. Foreldur, ið ættleiða barn, hava rætt til barsilsfarloyvi í sama mun, sum tey hava rætt til barsilspening eftir § 10.

***Fráboðan***

**§ 3.** Kvinnuligur løntakari, sum nýtir rættin til barsilsfarloyvi eftir § 1, stk. 1, skal innan 8 vikur eftir barnsburð boða arbeiðsgevara sínum frá, nær hon byrjar at arbeiða aftur.
*Stk. 2.* Maður, sum er løntakari, og sum nýtir rætt sín til barsilsfarloyvi eftir § 1, stk. 2, skal í seinasta lagi 4 vikur frammanundan boða arbeiðsgevara sínum frá, nær hann roknar við, hann er burtur frá arbeiði.
*Stk. 3.* Tey, sum fáa barn við ættleiðing, skulu við fráboðan til arbeiðsgevaran halda somu freistir.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um skyldur løntakaranna mótvegis arbeiðsgevaranum at geva fráboðanir í sambandi við barsilsfarloyvi eftir § 1.

***Vernd og endurgjald***
***Frávik***

**§ 4.** Ikki kann víkjast frá reglunum í §§ 1-2 til bága fyri løntakaran.

**§ 5.** Tað tíðarskeið, løntakari er í barsilsfarloyvi eftir §§ 1 og 2, verður roknað sum vanlig arbeiðstíð, tá starvsaldur skal roknast.

**§ 6.** Arbeiðsgevari kann ikki siga upp løntakara, tí viðkomandi hevur sett fram krav um at nýta rættin til barsilsfarloyvi eftir §§ 1 og 2, ella annars siga upp vegna viðgongu, barnsburð ella ættleiðing.

**§ 7.** Verður løntakari uppsagdur ella fyri vanbýti í móti reglunum í § 6, skal arbeiðsgevarin rinda eina samsýning, sum í mesta lagi svarar til løn í 50 vikur, ið verður at áseta alt eftir starvsaldri og umstøðunum annars.
*Stk. 2.* Verður løntakari uppsagdur ella á annan hátt fyri vanbýti í viðgongutíðini, undir barnsburði, eftir barnsburð ella ættleiðing, áliggur tað arbeiðsgevaranum at prógva, at uppsøgnin ikki var grundað á hesi viðurskifti.

**Partur II**
**Barsilspeningur**

**Kapittul II**
***Vanligar treytir***

**§ 8.** Barsilspeningur eftir hesi lóg verður veittur í sambandi við viðgongu, barnsburð og ættleiðing.
*Stk. 2.* Skyldur og rættindi sbrt. hesi lóg eru knýtt at móttiknum inntøkum, sum eftir skattalógini eru A-inntøkur, og inntøkum av sjálvstøðugari vinnu sbr. § 20.
Stk. 3. Rætturin til barsilspening er treytaður av føstum bústaði í Føroyum og fullari skattskyldu í Føroyum.
Stk. 4. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um,

1. í hvønn mun persónar, sum hava inntøkur, ið ikki eru fult skattskyldugar í Føroyum, hava rætt til barsilspening, og

2. at persónar, sum hava rætt til barsilspening í einum øðrum landi, ikki hava rætt til barsilspening í Føroyum.

## Kapittul III
### *Treytir fyri útgjaldi*

**§ 9.** Kvinna, sum hevur A-inntøku, og sum fer frá arbeiði, orsakað av viðgongu ella barnsburði, hevur rætt til barsilspening frá tí degi, mett verður, at 4 vikur eru eftir til barnsburð, ella frá tí løtu, hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur og/ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum, tó í fyrsta lagi frá tí degi, mett verður, at 13 vikur eru eftir til barnsburð. Eftir barnsburð hevur kvinna rætt til barsilspening í 24 vikur innan fyrstu 24 vikurnar eftir barnsburð. Rætturin til barsilspening er treytaður av, at kvinnan lýkur treytirnar í § 11.
*Stk 2.* Foreldrini kunnu í staðin velja, at faðirin at barninum skal vera heima hjá barninum í upp til 10 vikur eftir 14. viku eftir barnsburð, og harvið fáa barsilspening í hesum tíðarskeiðinum. Treytin fyri, at faðir at barni kann fá barsilspening í hesum tíðarskeiðinum, er at móðirin ikki samstundis er frá arbeiði við løn.
*Stk. 3.* Uttan mun til stk. 2 hevur faðir at barni rætt til barsilspening í upp til tvær vikur eftir barnsburð innan tær fyrstu 14 vikurnar eftir barnsburð.
*Stk.4.* Rætturin til barsilspening eftir stk. 2 og 3 er treytaður av, at faðir at barni lýkur treytirnar í § 11.

### *Ættleiðing*

**§ 10.** Foreldur, sum ættleiða børn, hava rætt til barsilspening í 26 vikur eftir, at tey hava fingið barnið, treytað av, at teir myndugleikar, sum kanna ættleiðingarmøguleikarnar, hava tikið ta avgerð, at annað av foreldrunum skal vera heima í sambandi við, at tey fáa barnið.
*Stk. 3.* Dagurin, tá tey fáa barnið, verður at javnmeta við føðing, og maður ella kvinna, ið ættleiða, verða at javnmeta við kvinnu, ið hevur átt.
*Stk. 4.* Treytirnar í § 11 eru eisini galdandi í sambandi við ættleiðing.

### *Arbeiðskrav*

**§ 11**. Rætturin til barsilspening er treytaður av, at móttakarin í minst 6 mánaðir innan fyri teir síðstu 12 mánaðirnar áðrenn fráverutíðarskeiðið hevur havt so mikið av arbeiði, at inntøkan í hesum tíðarskeiði í minsta lagi hevur verið 10% av lønini sbrt. sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag, rundað til nærmastu heilu krónuupphædd.

## Kapitul IV
## Stødd á barsilspeningi

### *Útrokningargrundarlag*

**§ 12.** Grundarlagið fyri útrokningini av barsilspeningi er móttikna miðal mánaðarliga gjaldskylduga A-inntøkan eftir § 18, íroknað tó dagpening vegna sjúku eftir dagpeningalógini seinastu 12 mánaðirnar áðrenn fráveruna.
*Stk. 2.* Hevur viðkomandi beint undan fráveruni verið á arbeiðsmarknaðinum í eitt styttri tíðarskeið enn tað, nevnt í stk. 1, verður barsilspeningurin útroknaður við grundarlagi í miðal móttiknu gjaldsskyldugu A-inntøkuni eftir § 18 hetta styttra tíðarskeiðið.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um tíðarskeiðið, sum skal verða nýtt sum

útrokningargrundarlag eftir stk. 2, og í hvørjum førum eitt styttri tíðarskeið kann verða nýtt sum útrokningargrundarlag.

### *Upphædd*

**§ 13.** Barsilspeningur er 100% av útrokningargrundarlagnum smbrt. § 12, tó soleiðis, at barsilspeningur ikki kann verða meira enn kr. 35.000 um mánaðin.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann hækka ta í stk. 1 ásettu hámarksupphædd við støði í lønargongdini í samfelagnum.

## Kapittul V
## Útgjald v.m.

### *Umsóknir*

**§ 14**. Umsókn um barsilspening skal latast inn innan 6 mánaðir eftir barnsburð ella, í sambandi við ættleiðing, eftir at tey hava fingið barnið. Er umsóknin ikki latin inn innan hesa freist, fellur rætturin til barsilspening burtur.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur reglur um útgjald, útgjaldsskeið, hvørjar upplýsingar skulu latast, hvør skal vátta hesar upplýsingar, freistir fyri innlatan av upplýsingum v.m.

### *Útgjald til arbeiðsgevara*

**§ 15.** Í tann mun arbeiðsgevari rindar A-inntøku í sambandi við barsilsfarloyvi, verður barsilspeningurin, sum løntakarin hevði havt rætt til sbrt. § 12, um viðkomandi ikki varð rindað A-inntøka, rindaður arbeiðsgevaranum.
*Stk. 2.* Í tann mun barsilspeningur til arbeiðsgevaran eftir stk. 1 røkkur, verður útgoldið fyri rindaðar A-inntøkur sbrt. § 12 frítíðarløn og frítíðarískoyti.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um umsókn frá arbeiðsgevaranum, hvørjar upplýsingar, hann skal lata í sambandi við útgjaldið, og freistir fyri innlatan av umsóknum og upplýsingum v.m.

### *Mótrokning*

**§ 16**. Landsstýrismaðurin ásetur reglur um í hvønn mun tann, sum hevur rætt til barsilspening, kann hava aðra inntøku, veiting ella eftirløn, samstundis sum viðkomandi fær barsilspening, og hvussu barsilspeningur skal skerjast í mun til nevndu inntøkur.

## Kapittul VI
## Fígging

### *Gjaldskyldug*

**§ 17.** Landskassin ber útreiðslurnar til barsilspening. Til partvísa fígging av barsilspeningi eftir hesi lóg verður til landskassan kravt eitt gjald, sum er ásett í § 19.
*Stk. 2.* Gjaldskyldug smbrt. stk. 1 eru

1. øll, sum fáa A-inntøku, sum hava fulla skattskyldu í Føroyum, og sum hava fylt 16 ár, men ikki 67 ár, og
2. øll, sum rinda A-inntøku í Føroyum.

*Stk. 3*. Persónar, sum eftir stk. 2, nr. 1, eru gjaldskyldugir, men sum ikki hava fastan bústað í Føroyum, kunnu eftir umsókn sleppa undan gjaldskyldu. Undantøkan hevur virknað frá tí degi, umsóknin er móttikin.
*Stk. 4*. Persónar, sum eftir løgtingslóg um almannapensjónir fáa hægstu fyritíðarpensjón, og persónar, sum eftir somu lóg fáa miðal fyritíðarpensjón, av tí teir eru oman fyri 60 ár, men sum annars vildu fingið hægstu fyritíðarpensjón, verða eftir umsókn undantiknir frá gjaldskyldu. Undantøkan frá gjaldskylduni hevur virknað frá tí degi, umsóknin er móttikin.

### *Gjaldsgrundarlag*

**§ 18**. Gjaldið verður kravt av øllum A-inntøkum, sum tey gjaldskyldugu fáa ella rinda, tó undantikið

1. fólka- og fyritíðarpensjón,
2. aðrar skattskyldugar almannaveitingar,
3. tænastumannapensjónir og aðrar líknandi eftirlønir, uppihaldspeningur sbrt. hjúnabandslógini og barnapeningur sbrt. "lov om børns retsstilling", og
4. A-inntøka til avmarkaða skattskyldu undir FAS-skipanini.

*Stk. 2*. Undantøka eftir stk. 1, nr. 3, verður veitt eftir umsókn, og undantøkan hevur virknað frá tí degi, umsóknin er móttikin.

### *Gjald*

**§ 19.** Gjaldið hjá teimum gjaldskyldugu er 0,25% av tí í § 18 nevnda gjaldsgrundarlagi.
*Stk. 2*. Gjaldið fellur til gjaldingar, samstundis sum teir gjaldskyldugu rinda ella fáa A-inntøku. Áðrenn A-inntøkan verður útgoldin, skal inngjaldið avroknast. Gjøld kunnu krevjast inn við panting.
*Stk. 3*. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um inngjald, heundir avgreiðslugjald.
*Stk. 4*. Landsstýrismaðurin kann við kunngerð broyta tað í stk. 1 nevnda gjald, tó ikki hægri enn 0,25%.

## Kapittul VII
## Sjálvstøðugt vinnurekandi v.m.

**§ 20.** Persónar, sum hava aðra inntøku av vinnu enn A-inntøku, hava rætt til barsilspening, um teir tekna eina trygging.
*Stk. 2*. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um, hvør kann tekna trygging, um inngjald, arbeiðskrav, útrokningargrundarlag, nær rætturin til barsilspening tekur við, eftir at umsókn um trygging er móttikin, eftirstøður, hvørjar upplýsingar tann, sum teknar trygging, skal lata, skiftisreglur v.m.
*Stk. 2*. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um, at persónar, sum annars ikki hava møguleika at koma undir skipanina, eftir egnum ynski tekna trygging og koma undir skipanina.

## Kapitul VIII
## Fyrisitingarligar ásetingar

### *Upplýsingar*

**§ 21**. Til nýtslu í sambandi við útrokning og eftirlit við inngjalds- og útgjaldsupphæddum eftir hesi lóg, kann landsstýrismaðurin útvega sær allar upplýsingar frá Toll- og Skattstovu Føroya, Landsfólkayvirlitinum, Almannastovuni.
*Stk. 2.* Fakfeløg og arbeiðsgevarar hava skyldu at geva landsstýrismanninum tær upplýsingar, hann biður um í sambandi við eftirlitsarbeiði og avgreiðslu av útgjaldi.

**§ 22.** Hevur umsøkjari givið landsstýrismanninum skeivar upplýsingar ella tagt um umstøður, sum hava havt týdning fyri barsilspeningin, kunnu upphæddir, sum av órøttum eru útgoldnar, verða kravdar afturgoldnar frá tí, sum hevur fingið peningin útgoldnan.

**§ 23.** Landsstýrismaðurin kann eftir nærri ásettum reglum gera gjaldsavtalur, heruppií avskriva krøv, tá útlit ikki eru at fáa allan peningin frá skuldaranum.

***Millumtjóða sáttmálar***

**§ 24.** Landsstýrismaðurin kann gera sáttmálar við onnur lond um barsilspening.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um barsilspening v.m. fyri teir persónar, sum fevndir eru av sáttmálum sambært hesi grein, heruppií fyri hesar persónar áseta reglur, sum víkja frá ásetingunum í lógini.

***Umsitingarmyndugleiki***

**25.** Landsstýrismaðurin kann við kunngerð leggja umsitingina av lógini til Arbeiðsloysisskipanina eftir avtalu við Arbeiðsloysisskipanina, ella til annan fyrisitingarligan myndugleika. Í slíkum føri verða heimildirnar, sum landsstýrismaðurin hevur eftir hesi lóg, latnar fyrisitingarmyndugleikanum, tó ikki heimildirnar at áseta reglur.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um umsiting og eftirlit.
*Stk. 3.* Avgerðir eftir hesi lóg ella eftir reglum, settum sbrt. lógini, kunnu kærast til landsstýrismannin innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann leggja kærumyndugleikan eftir stk. 3 til annan fyrisitingarligan myndugleika, og kann samstundis áseta, at avgerðir hjá kærumyndugleikanum ikki kunnu kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.
*Stk. 5.* Útreiðslur, ið standast av umsitingini av skipanini, verða rindaðar av landskassanum.

## Kapitul IX
## Revsi- og gildiskomuásetingar

***Revsing***

**§ 26.** Um ikki strangari revsing er ásett í aðrari lóggávu, verður viðkomandi, sum sambært hesi lóg gevur skipanini skeivar ella misvísandi upplýsingar, revsaður við sekt ella hefti.
*Stk. 2.* Fyri brot, sum løgfrøðiligir persónar, heruppií feløg, felagsskapir, grunnar, kommunur, land og statur gera, kann revisábyrgd verða áløgd tí løgfrøðiliga persóninum sum slíkur.
*Stk. 3.* Í reglum, ásettum eftir hesi lóg, kann revsing verða ásett fyri brot á reglurnar.

***Gildiskoma***

**§ 27.** Henda lóg fær gildi 1. apríl 2001.
*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi:

løgtingslóg nr. 37 frá 23. apríl 1999 um foreldrafráveru, orsakað av barnsburði, føðing og ættleiðing.

***Skiftisreglur***

**§ 28.** Persónar, sum, tá henda lóg fær gildi, hava rætt at fáa dagpening í sambandi við barnsburð útgoldnan eftir lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom eller fødsel, sbr. lovbekendtgørelse nr. 102 frá 2. mars 1988, sum broytt við løgtingslóg nr. 94 frá 13. juni 1995 (dagpeningalógin), hava rætt at fáa barsilspening útgoldnan eftir reglunum í hesi lóg.

## Almennar viðmerkingar

### *Endamál við uppskotinum*

- at allir løntakarar í mest møguligan mun fáa endurgjald fyri lønarmiss í sambandi við barnsburð,
- at skipanin umfatar bæði kvinnur og menn og bæði løntakarar og sjálvstøðugt vinnurekandi,
- at kvinnum verður rindað endurgjald í 4 vikur áðrenn barnsburð, og kvinnum og monnum í 26 vikur eftir barnsburð,
- at útvega betri grundarlag fyri eins møguleikum hjá kvinnum og monnum til arbeiði, og at
- fremja javnstøðu millum kvinnur og menn,
- at tryggja barninum samveru bæði við móðir og faðir,
- at umstøðurnar hjá hinum einstaka á arbeiðsmarknaðinum í sambandi við barnsburð og ættleiðing verða so eins sum møguligt, og at fíggjarligi kostnaðurin av barnsburði í mest møguligan mun verður borin av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

### Høvuðsinnihaldið í uppskotinum

***Barsilsfarloyvi***
Eftir uppskotinum verður løgtingslógin um foreldrafráveru tikin av, og reglurnar um foreldrafráveru tiknar upp í hetta lógaruppskotið. Reglurnar um rætt hjá foreldrum at vera frá arbeiði, orsakað av viðgongu, barnsburði og ættleiðing, verða í høvuðsheitum varðveittar óbroyttar, við nøkrum núgreiningum og uppískoytum.

***Barsilspeningur***
Skotið verður upp fyri allan arbeiðsmarknaðin, tann almenna sum tann privata, at gera eina felags skipan viðvíkjandi endurgjaldi fyri lønarmiss/lønarútreiðslur í sambandi við barnsburð og ættleiðing, sum skal loysa av tær almennu skipanir, sum í dag eru hesum viðvíkjandi, t.e. skipanin eftir dagpeningalógini um dagpening í sambandi við barnsburð og ættleiðing, og skipanin viðvíkjandi barsilsgrunninum hjá landinum.

Skipanin skal í mest møguligan mun bera kostnaðin av barnsburði og ættleiðing, bæði hjá løntakarum og hjá arbeiðsgevarum, og reglurnar í dagpeningalógini um dagpening í sambandi við barnsburð og ættleiðing verða tiknar av, eins og barsilsgrunnurin hjá landinum verður tikin av.

Partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu sjálvir verða við til at fíggja skipanina.

***Meginreglurnar í skipanini viðvíkjandi barsilspeningi eftir uppskotinum eru:***
Barsilspeningur verður rindaður fyri inntøkumiss, ið stendst av barnsburði og ættleiðing.

Barsilspeningur umfatar lønarinntøkur/lønarútreiðslur ella inntøkur av sjálvstøðugari vinnu.

Rindað verður til persónar, sum eru vinnuaktivir, t.e. krav um tilknýti til arbeiðsmarknaðin og arbeiðskrav.

Virðið, sum verður nýtt sum grundarlag, tá inntøkutapið skal roknast út, er A-inntøkan/inntøkan av sjálvstøðugari vinnu, sum viðkomandi væntandi hevði havt, um hann var í vinnu, sum verður ásett sum miðal móttikna mánaðarliga A-inntøkan seinastu 12 mánaðirnar áðrenn barsilsfarloyvi.

Barsilspeningurin skal endurrinda alt tapið hjá løntakarranum-100% -, tó við einum útgjaldshámarki upp á 35.000,- kr. um mánaðin.

Rindar arbeiðsgevarin løn í fráverutíðini, verður barsilspeningurin, sum løntakarin annars hevði havt rætt til, rindaður arbeiðsgevaranum.

Tey tryggjaðu, løntakarar, sjálvstøðugt vinnurekandi og arbeiðsgevarar, skulu sjálvi partvís fíggja skipanina við einum prosentgjaldi uppá 0,25%, sum verður lagt á móttiknar og rindaðar A- inntøkur og inntøkur av sjálvstøðugari vinnu.

**Bakstøði**

Bæði Løgtingsins trivnaðarnevnd (løgtingsmál 1998/117), Útnorðurráðið og javnstøðunevndin hava mælt til, at gjørd verður ein skipan, sum tryggjar øllum løntakarum fulla løn í sambandi við fráveru frá arbeiði, orsakað av barnsburði og ættleiðing.Við støði í hesum setti landsstýrismaðurin í vinnumálum nevnd, mannað við umboðum fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum, at gera uppskot til eina skipan um ein barsilsgrunn. Í arbeiðssetninginum hjá nevndini varð m.a. nevnt:

Barsilsgrunnurin hugsast at skipast soleiðis, at

- skipanin fyri grunnin verður staðfest við lóg,
- grunnurin skal fíggja munin millum goldnan dagpening og upp til lønina hjá teimum, sum fara í farloyvi – alternativt alla lønina hjá teimum, sum fara í farloyvi,
- grunnurin verður fíggjaður við líka stórum gjaldi frá arbeiðsgevarum og arbeiðstakarum,
- grunnurin skal virka fyri bæði foreldrini,
- umstøðurnar í sambandi við barnsburð verða so eins fyri øll sum møguligt,
- grunnurin skal fevna um allan arbeiðsmarknaðin.

Nevndin rakk ikki at tilevna uppskot, áðrenn arbeiðið í nevndini varð lagt niður, orsakað av ósemju um samsýningina til nevndarlimirnar. Vinnumálastýrið gjørdi tí útkastið til hetta uppskotið eftir tí arbeiðssetningi, sum givin varð nevndini. Uppi í arbeiðinum at tilevna útkast til uppskot hevur Vinnumálastýrið havt ALS og adv. hjá ALS.

<u>**Galdandi skipan**</u>

***Rætt til farloyvi***
Skipanin í dag er tann, at løntakarum í lóggávuni og í sáttmálum á arbeiðsmarknaðinum mótvegis arbeiðsgevaranum er tryggjaður rættur at vera frá arbeiði, orsakað av viðgongu (graviditeti), barnsburði, og ættleiðing. Rættur til farloyvi er tryggjaður kvinnum, og eftir barnsburð eisini monnum.

Farloyvisrætturin er reguleraður bæði í sáttmálum á arbeiðsmarknaðinum og í tí lóggávuni, sum regulerar viðurskiftini hjá einstøkum løntakarabólkum, sum t.d. tænastumannalóggávuni, starvsmannalógini, løgtingslógini um yrkisútbúgvingar, løgtingslóg um sjómenn v.m.

Útgangsstøðið er, at foreldrafráverulógin er galdandi í øllum setanarviðurskiftum uttan mun til, hvørjar reglur annars regulera hesi viðurskiftini. Løntakarin er vardur av reglunum uttan mun til, um hann er settur hjá tí almenna ella tí privata, og lógin umfatar eisini setanina uttan mun til, um talan er um setan smbrt. felagssáttmála, eins og løntakarin hevur rætt til fráveru uttan mun til, um hann kann krevja, at arbeiðsgevarin ella tað almenna rindar løn ella dagpening.

Sostatt eru viðurskiftini hjá løntakarum, tá tað snýr seg um fráverurættin í sambandi við barnsburð, einsháttað regulerað fyri allan arbeiðsmarknaðin, bæði tann almenna og tann privata.

Umstøðurnar hjá teimum, sum nýta fráverurættin eru tó framvegis sera ólíkar, tí reglurnar í foreldrafráverulógini viðvíkja bert spurninginum um rættin at vera frá arbeiði, ikki spurninginum um, hvussu vera skal við lønarviðurskiftunum ella møguligum lønarmissi í sambandi við fráveruna.

***Løn ella dagpening í sambandi við fráveru vegna barnsburð v. m.***
Hvørt løntakari, sum nýtir fráverurættin í sambandi við barnsburð v.m., hevur rætt til løn ella kompensatión fyri lønarmiss, veldst um, hvørjir felagssáttmálar ella einstaklingaavtalur eru, og hvørt tað eru serligar lógarreglur galdandi fyri setanina.

Fáar ella ongar lógarreglur eru um, at løntakari skal hava rætt til løn frá arbeiðsgevara, tá hann nýtir fráverurætt sín í sambandi við barnsburð, tó hevur kvinna, sum er umfatað av starvsmannalógini eftir § 6, stk. 3, í lógini, rætt til hálva løn í 2 mánaðir, tá hon er frá arbeiði, orsakað av barnsburði.

Annars eru lønarviðurskiftini í sambandi við barnsburð ikki regulerað í lóggávuni, men í sáttmálunum á arbeiðsmarknaðinum.

Sáttmálaviðurskiftini á hesum økinum eru sera ymisk. Tað er munur á viðurskiftunum hjá alment settum og viðurskiftunum hjá privat settum, og millum tey privat settu er munurin eisini stórur.

Tey, sum ikki hava rætt til fulla løn eftir sáttmálunum - alment og privat sett - hava rætt til dagpening eftir dagpeningalógini, um tey annars lúka krøvini eftir lógini.

Hvørki eftir galdandi lóggávu ella eftir galdandi sáttmálum eru reglur um rætt til løn ella dagpening til menn í sambandi við barnsburð.

***Dagpeningur í sambandi við barnburð eftir dagpeningalógini***
Tá dagpeningalógin kom í gildi í 1979, kundi dagpeningur veitast løntakarum fyri mista inntøku í sambandi við óarbeiðsføri, orsakað av sjúku, skaða ella barnsburði.

***Høvuðsreglur í dagpeningalógini***
Kvinnur, sum eru løntakarar, og sum ikki hava rætt til løn í sambandi við viðgongu ella barnsburð, hava rætt til dagpengar.

Kvinnur, sum hava teknað trygging eftir kapittul 5 í lógini, t.e. kvinnur, sum hava aðra inntøku enn lønarinntøku, og kvinnur, sum eru heimagangandi, og sum gera húsligt arbeiði fyri minst ein persón, umframt seg sjálvan.

Sjómenn við føroyskum fiskiskipi og útróðrarmenn við egnum ella annan mans fiskifari.

***Krav um tilknýti til Føroyar***
Tann, sum hevur rætt til dagpening, hevur tilhald í Føroyum, og tá viðkomandi gerst óarbeiðsførur, hevur havt tilhald her í minsta lagi 6 vikur. Fyribils tilhald uttanlands, men við bústaði í Føroyum, verður javnt sett við tilhald í Føroyum.

***Treytir fyri útgjaldi***

*Óarbeiðsføri*
At lækni metir, at tað er óforsvarligt at arbeiða, tó í fyrsta lagi 6 vikur áðrenn barnsburð, í serligum førum upp til 13 vikur. Eftir barnsburð hevur kvinnan rætt til dagpening í 24 vikur, og tá er einki krav um dokumentatión um óarbeiðsføri.

*Arbeiðskrav*
At kvinnan í minsta lagi í 6 mánaðir innanfyri seinastu 12 mánaðirnar hevur havt arbeiði í tilíkan mun, at inntøka hennara í hesum tíðarskeiðinum gevur henni rætt til í minsta lagi 10% av hægstu dagpeningaupphædd, t.e. 80% av galdandi vikuløn hjá ófaklærdum arbeiðarum.

*Aðrar inntøkur í útgjaldsskeiðinum*
Um dagpeningur saman við øðrum kontantveitingum, heruppií arbeiðsinntøkum, men undantikið almennari hjálp, fer upp um arbeiðsinntøkuna, verður dagpeningur lækkaður við upphæddini, sum er omanfyri arbeiðsinntøkuna.

***Útrokningargrundarlag***
Miðal arbeiðsinntøkan um vikuna seinastu 5 vikurnar áðrenn óarbeiðsføri ella, um kvinnan hevur havt arbeiði í minni enn 5 vikur, miðalinntøkan um vikuna ta tíð, hon hevur havt arbeiði. Landsstýrismaðurin kann fyri serligar bólkar av løntakarum áseta eitt annað útrokningartíðarskeið, og landsstýrismaðurin kann áseta eitt annað útrokningargrundarlag, tá inntøkuviðurskiftini eru broytt munandi, tá viðkomandi gjørdist óarbeiðsførur, ella tá inntøkuviðurskiftini vórðu munandi broytt, um viðkomandi ikki gjørdist óarbeiðsførur.

***Upphædd***
80% av útrokningargrundarlagnum, tó í mesta lagi 80% av galdandi vikuløn hjá ófaklærdum arbeiðarum. Upphæddir, minni enn 10% av hægstu dagpeningaupphædd, verða ikki útgoldnar.

***Fígging og umsiting av dagpeningi***
Í § 8 í løgtingsfíggjarlógini 2000 eru játtaðar 45 mió. kr. til dagpening, harav verður mett, at uml. 15 mió. kr. verða nýttar til dagpening í sambandi við barsilsfarloyvi. Dagpeningaskipanin verður umsitin av Almannastovuni.

**Løn í sambandi við barnsburð eftir sáttmálunum**

***Almenni arbeiðsmarknaðurin***
Í felagssáttmálunum millum landsstýrið og feløgini hjá teimum alment settu, hava flest allar kvinnur, sum eru settar hjá landinum, rætt til fulla løn alla fráverutíðina.

§ 9 í galdandi sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið er í § 9 soljóðandi:

*"Stk. 2. Starvskvinnu verður veitt full løn fyri tíðina, frá tí hon gerst óarbeiðsfør, tó í mesta lagi 8 vikur undan føðing, og tilsamans 24 vikur. Afturat kann hon fáa frí uttan løn í 6 vikur. Starvskvinna kann umframt eftir umsókn fáa frí uttan løn í 5 mánaðir uttan miss í lønaraldri. Í hesum sambandi kann starsvmaður eisini eftir umsókn fáa frí uttan løn í 1 mánaða uttan miss í lønaraldri.*
*Stk. 3. Umframt tær í stk 2 nevndu sømdir kann starvskvinna fáa 6 mánaða sjúkrafrí í slíkum førum, har hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur og/ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum. Undir slíkum umstøðum verður veitt starvskvinnu full løn.*
*Stk. 4. Um starvskvinna ættleiðir barn, kann hon eftir umsókn fáa upp til 24 vikur frí við løn. Í hesum sambandinum kann starvsmaður eisini eftir umsókn fáa frí uttan løn í 1 mánaða uttan miss í lønaraldri".*

Líknandi reglur eru ásettar í hinum sáttmálunum millum feløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum og Fíggjarmálastýrið soleiðis, at flest øllum kvinnuligum løntakarum á almenna arbeiðsmarknaðinum eru tryggjað fulla løn í farloyvistíðini.

***Fígging og umsiting av løn hjá alment settum í sambandi við barnsburð***
Í semjuni, sum gjørd varð millum landsstýrið og tjúgu fakfeløg 9. apríl 1995, er avtalað, at frá 1. januar 1996 skuldi felags barsilsgrunnur setast á stovn. Hetta varð gjørt soleiðis, at 0,8% av lønarpartinum hjá øllum almennum stovnum skuldi setast inn á eina felagskonto at gjalda starvsfólki, sum kemur í staðin fyri tær starvskvinnur, sum eru í barsilsfarloyvi. Grunnurin skuldi setast á stovn fyri at forða fyri, at summir stovnar verða raktir serliga hart, tá ið starvskvinna fer í barsilsfarloyvi. Síðan 1997 hava barsilsfarloyvini verið fíggjað við játtan á fíggjarlógini.

Í uppskotinum til fíggjarløgtingslóg 2001 er í § 3 avsettar 10,1 mió. kr. til grunnin.

Grunnurin verður umsitin av Gjaldstovuni.

***Privati arbeiðsmarknaðurin***
Her eru fáar avtalur um rætt til løn í sambandi við barnsburð. Kvinnur, sum eru umfataðar av starvsmannasáttmálanum, hava frá arbeiðsgevaranum rætt til ½ løn í 2 mánaðir, hetta er galdandi fyri S&K-limir. Starvssett hjá fíggjar-og tryggingarstovnum hava rætt til fulla løn í farloyvistíðini. Í sáttmálunum millum arbeiðarafeløgini hjá tímaløntum og arbeiðsgevarafeløgini eru ikki reglur, sum geva rætt til løn í sambandi við barnsburð.

Løn og dagpeningur kann, innan fyri karmarnar av hægstu dagpeningaupphædd og arbeiðsinntøkuni, setast saman soleiðis, at arbeiðsgevari t.d. rindar hálva løn og dagpeningaskipanin restina upp til fulla løn.

***Í mun til galdandi skipan merkir uppskotið:***

*Fyri løntakarar*
Fyri kvinnur, sum eftir galdandi lóggávu ella sáttmálum hava rætt til fulla løn í sambandi við barnsburð og ættleiðing, verður eingin broyting viðvíkjandi rættinum til løn. Hetta er galdandi fyri allar kvinnur, sum eru í føstum starvi hjá landinum, kommununum, fíggjar- og tryggingarstovnunum, Føroya Tele, SEV v.fl.

Fyri kvinnur, sum eftir galdandi lóggávu og sáttmálum ikki hava rætt til fulla løn í sambandi við barnsburð og ættleiðing, merkir uppskotið, at tær ikki longur fáa dagpening eftir dagpeningalógini, men barsilspening eftir reglunum í hesum uppskotinum. Hetta merkir fyri nógv tær flestu eina munandi hækking av endurgjaldinum í mun til tað endurgjald, ið kann fáast eftir dagpeningalógini, við tað at hámarkið fyri útgjaldinum eftir uppskotinum er kr. 35.000,-, meðan hámarkið eftir dagpeningalógini er 80% av eini arbeiðaraløn. Hetta er galdandi fyri meginpartin av tímaløntu kvinnunum á privata arbeiðsmarknaðinum.

Menn hava, sum nevnt omanfyri, hvørki eftir galdandi lóggávu ella sáttmálum rætt til løn ella dagpening í sambandi við barnsburð (í sambandi við ættleiðing eru serligar reglur). Eftir ásetingunum í uppskotinum fáa teir rætt til barsilspening í 2 vikur, umframt at teir av teimum 24 vikunum eftir barnsburð, sum mamman at barninum hevur rætt til barsilspening, kunnu fáa barsilspening í upp til 10 vikur.

*Fyri arbeiðsgevarar:*
Fyri arbeiðsgevarar, sum eftir galdandi lóggávu ella sáttmálum rinda partvísa ella fulla løn í sambandi við barnsburð, hava ásetingarnar í uppskotinum ta broyting við sær, at allir arbeiðsgevarar, bæði almennir og privatir, fáa endurrindað lønarútreiðslurnar.

Landið rindar eftir sáttmálunum kvinnum fulla løn í sambandi við barnsburð, sum verður fíggjað við játtan á fíggjarløgtingslógini, uml. 10 mió. kr. í § 3. Eftir uppskotinum verða hesar útreiðslurnar nærum allar fíggjaðar av barsilsskipanini. Hinvegin skal landið sum arbeiðsgevari vera við til at fíggja skipanina við barsilspeningi eftir uppskotinum, t.e. uml. 3 mió. kr. (1,2 mia.: 0,25%).

Fyri arbeiðsgevarar, sum eftir galdandi lóggávu og sáttmálum ikki rinda partvísa ella fulla løn, hevur uppskotið ongar broytingar við sær í mun til tey starvssettu, men hesir skulu eisini vera við at fíggja skipanina og rinda 0,25% av øllum lønarútgjaldingum.

*Fyri viðurskiftini millum løntakarar og arbeiðsgevarar sínámillum*
Viðurskiftini millum arbeiðsgevara og løntakara viðvíkjandi rættindum og skyldum viðvíkjandi løn í sambandi við barnsburð verða ikki ávirkað av ásetingunum í hesum lógaruppskotinum.

**Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar av uppskotinum**

***Fíggjarligar avleiðingar***
Mett verður, at árliga útgjaldið frá skipanini vegna barnsburð og ættleiðing til mammur og pápar verður uml. 44-46 mió. kr. Fortreytirnar fyri hesum eru:

Í 1998 og 1999 vórðu fødd 627 børn. 13% av føðandi kvinnum hava ikki tilknýti til arbeiðsmarknaðin, og er útreiðslugrundarlagið sostatt 547 kvinnur.
Mammuni verður goldin barsilspeningur í 18 vikur.
Pápanum verður goldin barsilspeningur í 12 vikur.
Miðal ársinntøkan hjá monnum í aldrinum 20-40 ár er 177.820,-kr., og miðal vikuløn kr. 3.420,-.
Miðal ársinntøkan hjá kvinnum í aldrinum 20-40 ár er 115.764,-kr., og miðal vikuløn kr. 2.226,-.

***Samlað útgjald fyri hvørt barnið: kr. 81.107,54.***

**Samlað útgjald: kr. 44.345.060,01.**

Grundarlagið fyri útrokningini omanfyri er barsilspeningur í tilsamans 30 vikur, 4 vikur áðrenn barnsburð og tilsamans 26 vikur eftir barnsburð. Í útrokningini eru ikki tikin serlig atlit til, at møguligt er, undir serligum umstøðum, at fáa barsilspening í upp til 13 vikur áðrenn barnsburð.

Útreiðslur landskassans í sambandi við barnsburð og ættleiðing eru eftir dagpeningalógini uml. 15 mió. kr., og eftir reglunum um barsilsgrunnin hjá landinum uml. 10 mió. kr. Við tað at endurgjald fyri lønarmiss í sambandi við barnsburð og ættleiðing, og endurgjald fyri lønarútreiðslur í hesum sambandinum, eftir uppskotinum verður rindað av barsilsskipanini, kunnu nevndu upphæddir, sum eru játtaðar á løgtingsfíggjarlógini, í ávikavist § 6 og § 3 strikast, og flytast hesi skipanini, sum her er skotin upp. Her skal tó viðmerkjast, sum eisini nevnt omanfyri, at endurgjaldið til landið sum arbeiðsgevara ikki dekkar allar útreiðslurnar fult og heilt, við tað at arbeiðgevaraparturin av ALS-gjaldi, gjald til arbeiðsmarknaðareftilønargrunn, gjaldið til trygdargrunn, eftirlønir, sum ikki verða rindaðar sum partur av lønini um A-skattaskipanina, ikki verður rindað av barsilsskipanini, umframt lønargjaldingar omanfyri hámarkið uppá kr. 35.000,- fyri útgjaldi, ikki verða endurrindaðar.

Verða uml. 25 mió. kr. fíggjaðar yvir vanliga skattin, eru eftir at fíggja uml. 21 mió. kr.

***Gjald***
Til fígging av hesum uml. 21 mió. kr., sum er meirkostnaðurin av hesi skipanini í mun til galdandi skipan, er ætlanin at leggja eitt prosentgjald á A-inntøkur uppá 0,25%, sum løntakarar móttaka og sum arbeiðsgevarar rinda, ella tilsamans 0,50%.

Hetta fæst soleiðs:
A-inntøka, sum ALS-gjald varð roknað av í 1999, kr. 4.217.423.100,00
21.000.000 : 4.217.423.100 x 100 = 0,50%

*Umstingarligar avleiðingar*
Dagpeningur, heruppií dagpeningur í sambandi við barnsburð, verður umsitin av Almannastovuni. Umsitingin á Almannastovuni av dagpeningi í sambandi við barnsburð eftir dagpeningalógini, verður niðurløgd. Ætlanin er, at ALS skal umsita barsilsskipanina, og verður mett, at kostnaðurin av umsitingini verður uml. 1,8 mió. kr. árliga. Fyrsta árið verður

kostnaðurin tó uml. 2,8 mió. kr., við tað at byrjanarkostnaðurin verður mettur til kr. 1.000.000,-.

Umsitingin av barsilsgrunninum hjá landinum á Gjaldstovuni verður niðurløgd.

Avleiðingar av lógaruppskotinum:

| | Fyri landið/ Landsmyndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í Landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja<br><br>Meirútreiðsla, uml. 21 mió. kr.<br><br>Meirinntøka, uml. 21 mió. kr.<br><br>Meirútreiðsla hjá stýrum og stovnum til lønar-útreiðslur, sum ikki verða dekkaðar av barsilspeningi. | Ja<br><br>Meirútreiðsla uppá 0,25% av lønargjalding-<br><br>um.<br><br>Meirinntøka av barsilspeningi. | Nei | Ja<br><br>Løntakarar á privata arbeiðs-marknaðinum.<br><br>Meirinntøka, svarandi til munin millum dagpening og fulla løn.<br><br>Meirútreiðsla upp á 0,25% av lønarinntøku. | Ja<br><br>Meirútreiðsla uppá 0,25% av lønargjalding-um.<br><br>Meirinntøka, endurgjald í førum, har løn verður rindað í samb. við barnsburð. |
| Umsitingar-ligar avleiðingar | Ja<br><br>Meirútr. til umsiting av skipan uppá uml. 1,8-2,0 mió. kr.<br><br>Minniútreiðsla av umsitingini av dagpeninga-lógini. | Ja<br><br>Umsóknir um barsilspening. | Nei | Ja<br><br>Umsóknir um barsilspening. | Ja<br><br>Umsóknir um endurgjald. |
| Umhvørvis-ligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Ja<br><br>Betri umstøður | Nei |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | | at sameina arbeiðs- og familjulív | |

**Ummæli**

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá feløgunum á arbeiðsmarknaðinum, sí hjálagda skjal.

***Skipan av uppskotinum***
Uppskotið er skipað soleiðis:

**Partur I**

***Kapittul I***
Her eru reglurnar ásettar, sum regulera rætt løntakaranna mótvegis arbeiðsgevaranum at vera frá arbeiði í sambandi við barnsburð v.m., og reglur, sum skulu verja henda rætt.

**Partur II**
***Barsilspeningur***

***Kapittul II***
Vanligar treytir.

***Kapittul III***
Treytir fyri útgjaldi

***Kapittul IV***
Stødd á barsilspeningi.

***Kapittul V***
Útgjald v.m.

***Kapittul VI***
Fígging.

**Partur IV**

***Kapittul VII***
Sjálvstøðugt vinnurekandi v.m.

**Partur V**

***Kapittul VIII***
Fyrisitingarligar ásetingar

**Partur VI**

***Kapittul IX***
Revsi-og gildiskomu ásetingar

**<u>Viðmerkingar til einstøku ásetingarnar:</u>**

**Til § 1**

Ásetingin er innihaldsliga tann sama sum § 1, stk. 1, og stk. 3 –6, í løgtingslógini um foreldrafráveru. § 1, stk. 2, í løgtingslógini um foreldrafráveru er tó ikki endurtikin í uppskotinum, tí hon einki sjálvstøðugt innihald hevur umframt tað, sum er ásett í stk. 1, at tað er móðirin, sum hevur rætt til barsilsfarloyvi tær fyrstu 14 vikurnar eftir barnsburð. Reglur, sum svara til tær í stk. 6 í nevndu løgtingslóg, eru settar í § 2 í uppskotinum.

**Til § 2**

Ásetingin gevur ættleiðingarforeldrum rætt til fráveru í 26 vikur eftir móttøku av barninum, undir teimum treytum, sum nevnd eru í § 10 í uppskotinum.

**Til § 3**

Ásetingin hevur í sær reglurnar um fráboðanarskyldu hjá foreldrum í sambandi við, at tey skulu nýta rætt til fráveru eftir § 1. Fráboðanarskyldan hjá móður viðvíkur skylduni, eftir at hon er farin í barsilsfarloyvi, at boða frá, nær hon kemur aftur til arbeiðis, og skylduna hjá faðir at barninum at boða frá frammanundan, nær hann væntar at nýta sín rætt eftir § 1.

Eftir starvsmannalógini hava kvinnur skyldu at boða arbeiðsgevaranum frá frammanundan, nær tær vænta, at barnið verður føtt. Hetta er eisini ásett í sáttmálunum á arbeiðsmarknaðinum, og má haldast at vera galdandi eftir vanligum arbeiðsrættarligum reglum.

Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um fráboðanarskylduna.

Ásetingin er eisini galdandi í sambandi við ættleiðing.

Ásetingin er í samsvari við galdandi áseting í § 4 í fráverulógini, uttan tað, at eftir uppskotinum skal landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um fráveruna.

**Til § 4**

Eftir hesi áseting kann løntakari ikki við avtalu lata frá sær rættindi, hann hevur eftir reglunum í lógaruppskotinum, um støðan hjá honum av hesum gerst verri enn tann støðu, honum er tryggjað eftir ásetingunum í uppskotinum. Reglan er ásett til tess at fyribyrgja, at gjørt verður galdandi, at løntakari hevur sagt frá sær sín rætt eftir ásetingunum í uppskotinum.

Í mun til galdandi reglur um rætt til fráveru er ásetingin nýggj.

**Til § 5**

Tá løntakari er í barsilsfarloyvi eftir § 1, vinnur hann sær, eftir hesi ásetingini, starvsaldur eftir teimum reglum, sum galdandi eru fyri setanina, t.e. lønaraldur, lønaraldur viðvíkjandi uppsagnarfreist v.m.

**Til § 6**

Ásetingin setur bann fyri at siga starvsfólki upp, um grundgevingin er, at viðkomandi hevur sett krav um at fáa sín rætt til barsilsfarloyvi, ella hevur nýtt sín rætt at vera í barsilsfarloyvi eftir § 1.

Ásetingin svarar til § 3 í løgtingslógini um foreldrafráveru.

**Til § 7**

Hetta er sama áseting, sum galdandi § 6, stk. 4 og 5, í løgtingslóg um javnstøðu, og § 6 - stk. 4 og 5 - í javnstøðulógini eigur at verða tikin av, tá hendan ásetingin í uppskotinum er komin í gildi.

**Til § 8**

Í hesi áseting eru reglurnar um, hvørjir tilburðir skulu vera grund fyri, at barsilspeningur kann útgjaldast, og hvørjar inntøkur skulu vera grundarlag fyri rættindum og skyldum eftir hinum ásetingunum í lógaruppskotinum.

Grundirnar fyri at veita barsilspening eru viðgonga (graviditetur), barnsburður og ættleiðing.

Eisini eftir galdandi dagpeningalóg verður dagpeningur, umframt sjúku og skaða, veittur í sambandi við barnsburð og ættleiðing, og eftir sáttmálunum á almenna arbeiðsmarknaðinum verður løn rindað í sambandi við fráveru orsakað av viðgongu, barnsburði og ættleiðing.

Eftir hesi ásetingini verða rættindi og skyldur eftir hinum ásetingunum í lógaruppskotinum knýtt at, um viðkomandi hevur A-inntøku ella inntøku av sjálvstøðugari vinnu.

Barsilspeningur skal eftir uppskotinum endurrinda fyri inntøkutap, ið stendst av barnsburði. Avgerandi fyri, um - og í hvønn mun - barsilspeningur skal útgjaldast ella gjaldast skal til skipanina, eigur tí at vera, um inntøkurnar kunnu vera mistar, orsakað av barnsburði ella v.ø.o., um hetta eru inntøkur, sum eru tryggjaðar.

Inntøkur, sum kunnu vera mistar, orsakað av barnsburði, eru inntøkur av egnum arbeiði, lønarinntøkur ella inntøkur av sjálvstøðugum vinnuvirksemi.

Undir viðgerðini av uppskotinum í Vinnumálastýrinum hevur spurningurin um at nýta lønarinntøkuna ella A-inntøkuna sum grundarlag verið serliga viðgjørdur.

Tað verður mett, at stórir umsitingarligir fyrimunir eru av at nýta A-inntøkuna sum grundarlag, heldur enn lønarinntøkuna.

Eisini varð mett, at teir vansar, ið kunnu standast av, at A-inntøka eftir skattalógini eisini umfatar inntøkur, sum eftir frammanfyri nevnda ikki eiga at vera grundarlag fyri rættindum og skyldum eftir lógaruppskotinum, í stóran mun kunnu greiðast, partvíst við, at ávísar inntøkur, sum eftir skattalógini eru A-inntøkur, verða undantiknar A-inntøkunum eftir ásetingunum í hesum lógaruppskotinum, og partvíst við, at rættindi og skyldur eftir lógaruppskotinum eisini kunnu knýtast til inntøkur, sum eftir skattalógini ikki eru A-inntøkur, men annars eiga at vera roknaðar sum inntøkur, ið kunnu verða tryggjaðar eftir ásetingunum í lógaruppskotinum.

Heimildirnar til landsstýrismannin, sum eru settar í stk. 4, nr. 1 og 2, eru heimildir at áseta reglur, sum skulu samskipa ásetingarnar í hesum uppskotinum við ásetingar í øðrum londum um somu viðurskifti.

**Til § 9**

Eftir hesi ásetingini hevur kvinna rætt til barsilspening frá tí løtu, at mett verður, at 4 vikur eru eftir til barnsburð. Um lækni metir, at tað ikki er ráðiligt, at kvinnan heldur fram at arbeiða, tí at vandi er á ferð fyri hana ella fostur, kann barsilspeningur kortini verða veittur frá tí løtu, at mett verður, at 13 vikur eru eftir til barnsburð.

Aftaná barnsburð kann barsilspeningur verða rindaður í tilsamans 26 vikur.

Mamman hevur rætt til barsilspening í 24 vikur eftir barnsburð. Pápin hevur rætt til barsilspening í 2 vikur, sum skulu liggja innanfyri tær fyrstu 14 vikurnar eftir barnsburð.

Foreldrini kunnu harumframt avtala, at í staðin fyri mammuna, skal pápin hava barsilspening í upp til 10 vikur aftáná 14. viku eftir barnsburð. Hava foreldrini einki avtalað, um at pápin skal hava barsilpening, ella kunnu tey ikki semjast um hetta, er tað mamman, sum hevur rætt til barsilspeningin.

Rætturin hjá pápanum til barsilspening í 2 vikur innanfyri fyrstu 14 vikurnar er ein sjálvstøðugur rættur hjá pápanum.

Fyritreytin fyri rættinum hjá monnum til barsilspening er, at hann er giftur við kvinnu, sum hevur føtt barn, ella at hann hevur viðurkent faðirskapin, ella er dømdur sum faðir at barninum.

**Til § 10**

Tá ættleiðingarforeldrini fara eftir barninum í útlandinum, kann móttøkan av barninum verða roknað frá tí løtu, at barnið er saman við foreldrunum.

**Til § 11**

Grundin til at arbeiðskrav verður sett, er, at barsilspeningur er ætlaður at vera endurgjald fyri tap av vinnuligum inntøkum, lønarinntøkum ella inntøkum av sjálvstøðugum vinnuvirksemi.

Hóast inntøkurnar eru umfataðar av § 8 og inntøkugrundarlag er eftir § 12 fyri útgjaldi, kann hetta ikki uttan víðari leggjast til grund fyri útgjaldi, tí um viðkomandi, uttan mun til barnsburðin, onga vinnuinntøku hevði havt í tíðarskeiðinum, barsilspeningur verður veittur, er einki tap vegna barnsburð at rinda fyri. Hetta eru vanligar endurgjaldsrættarligar reglur, sum skotið verður upp eisini at nýta til regulering av, um barsilspeningur skal rindast.

Ásetingin svarar til ásetingina í galdandi dagpeningalóg, og verður skotin upp, fyri at so fá sum gjørligt skulu detta niður í millum galdandi skipan eftir dagpeningalógini og skipanini eftir uppskotinum um barsilsskipan.

**Til § 12**

Í hesi áseting í lógaruppskotinum eru reglurnar fyri, hvat grundarlag skal verða nýtt, tá barsilspeningur skal útroknast.

Skotið verður upp at nýta eitt 12 mánaðar tíðarskeið sum útrokningargrundarlag, við møguleika at nýta eitt styttri tíðarskeið, og at tað er miðal mánaðarliga A-inntøkan, sum viðkomandi hevur móttikið í hesum tíðarskeiðinum, sum skal verða grundarlagið fyri útrokningi av, hvussu stór upphædd skal útgjaldast í barsilspeningi, ella, um eitt styttri tíðarskeið verður nýtt, miðal A-inntøkan tað styttra tíðarskeiðið.

Eftir dagpeningalógini og uppskotinum til nýggja dagpeningalóg er tíðarskeiðið, sum nýtt verður sum útrokningargrundarlag, 5 tær seinastu vikurnar undan fráveruni.

Mett verður, at yvirhøvur er eitt 12 mánaðar tíðarskeið eitt meira umboðandi tíðarskeið, um hetta skal fata um flest møgulig føri, og sleppast skal undan óhepnum avleiðingum, tó soleiðis, at atlit kunnu takast til m.a. tey, sum nettupp eru komin inn á arbeiðsmarknaðin.

Skotið verður upp, at landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um tað styttra tíðarskeiðið, sum skal nýtast, tí tørvur kann verða á at broyta hetta, alt eftir teimum umsitingarligu royndunum, sum verða gjørdar.

Útrokningartíðarskeiðið verður roknað frá tí degi, mamman ella pápin í royndum fara frá arbeiði vegna viðgongu, barnsburð ella ættleiðing. Mamman kann undir vanligum umstøðum fara frá arbeiði í upp til 4 vikur áðrenn, men um heilsuvandi er fyri hana ella fostur at arbeiða, og læknaváttan er um hetta, í upp til 13 vikur áðrenn.

Útrokningartíðarskeiðið verður roknað frá tí degi, foreldrini í royndum fyrstu ferð fóru frá arbeiði, eisini um fráveran innanfyri tær ávikavist 4 (13) vikurnar áðrenn barnsburð, ávikavist tær 26 vikurnar eftir barnsburð, liggur í fleiri tíðarskeiðum.

**Til § 13**

Her verður ásett, hvussu stóran part av tapinum, sum tað er gjørt upp eftir § 12, barsilspeningur skal rinda. Eftir ásetingini verður tapið rindað 100%, tó soleiðis, at tað hægst kunnu rindast kr. 35.000 um mánaðin.

Eftir galdandi dagpeningalóg er hægsta dagpeningaupphædd 80% av eini arbeiðaraløn. Í mun til galdandi reglur um, hvussu stórur partur av kostnaðinum av barnsburði verður rindaður av tí almenna, er sostatt talan um munandi broytingar.

Fyri tey, ið ikki fáa løn í sambandi við barnsburð, merkir hetta fyri tey flestu fult endurgjald fyri tapið í mun til verandi støðu, har avleiðingin av fráveru frá arbeiði vegna barsil fyri tey flestu er ein inntøkuskerjing, tí tey bert hava dagpening at dúva uppá, og við tað, at mesta dagpeningaupphædd er 80% av eini arbeiðaraløn.

Hjá teimum, sum eftir galdandi sáttmálum hava rætt til fulla løn í sambandi við barnsburð, verður støðan eftir uppskotinum í mun til verandi støðu óbroytt.

**Til § 14**

Tann, sum hevur rætt til barsilspening, skal gera sín rætt galdandi við at lata inn umsókn við neyðugum upplýsingum og skjalprógvum.

Stk. 1 í ásetingini er ein fyrningar- og passivitetsregla soleiðis, at krøv um barsilspening, sum ikki verða gjørd galdandi innanfyri ásettu freisitina, ikki seinni kunnu verða gjørd galdandi.

Eftir ásetingini í stk. 2 fær landsstýrismaðurin heimild at seta nærri reglur um, hvussu útgoldið verður, hvørjar upplýsingar umsøkjarin skal lata, váttanir v.m.

**Til § 15**

Her verður ásett, at arbeiðsgevarin, í tann mun hann rindar løn í sambandi við barnsburð ella ættleiðing, fær útgoldið barsilspeningin, sum rættindahavarin annars hevði fingið sbrt. ásetingunum í lógaruppskotinum.

Kravið hjá arbeiðsgevaranum er leitt av kravinum hjá løntakaranum, og arbeiðsgevarin fær ikki størri upphædd útgoldna, enn hann í royndum rindar løntakaranum í farloyvistíðini, og heldur ikki størri upphædd enn løntakarin hevði fingið eftir ásetingunum, um løntakaranum ikki varð rindað løn í fráverutíðini.

Í tann mun, barsilspeningurin røkkur, verður rindað til arbeiðsgevaran fyri arbeiðsgevarans dokumenteraðu útreiðslur til rindaðar A-inntøkur, frítíðarløn og frítíðarískoyti.

**Til § 16**

Eftir hesi ásetingini fær landsstýrismaðurin heimild at áseta í kunngerð, í hvønn mun tann, sum fær barsilspening, kann hava aðra inntøku.

Eftir dagpeningalógini er ásett, at mótroknast skal í dagpeningaupphæddini í tann mun, viðkomandi við øðrum regluligum útgjaldingum, almenn hjálp undantikin, men íroknað lønarinntøkur, fer upp um vanligu arbeiðsinntøkuna, hann hevur.

Umhugsast skal, um líknandi reglur, sum tær í dagpeningalógini, skulu ásetast smbrt. hesi ásetingini í lógaruppskotinum.

**Til § 17**

Reglan í stk. 1, pkt. 1, er sett fyri at gera greitt, at útreiðslurnar av skipanini er ein lógbundin landskassaútreiðsla.

Ásetingin inniheldur reglurnar um, hvør er gjaldsskyldugur til skipanina.

Inngjaldskyldug eru øll, sum eru millum 16 og 67 ár, sum móttaka A-inntøku og sum hava fulla skattskyldu í Føroyum, og øll, sum rinda A-inntøku í Føroyum. Um persónur er gjaldskyldugur, er - eftir hesi ásetingini - knýtt at, um persónurin rindar ella móttekur A-inntøkur í Føroyum soleiðis, at innkrevjingin kann fara fram um A-skattaskipanina.

**Til § 18**

Í hesi ásetingini eru reglurnar um, av hvørjum inntøkum hjá teimum gjaldskyldugu gjaldið til skipanina verður roknað. Gjald verður kravt av øllum A-inntøkum, sum ikki eru serliga undantiknar í ásetingini. Í ásetingini viðvíkjandi útrokningargrundarlagnum fyri útgjald, § 12 í uppskotinum, er víst til hesa ásetingina, og tað er sostatt tann inntøka, sum rindað verður av, sum gevur rætt til útgjald.

**Til § 19**

Eftir hesi ásetingini verður gjaldið hjá teimum, sum eftir § 17 eru gjaldskyldug, 0,25% av gjaldsgrundarlagnum eftir grein 18. Víst verður til almennu viðmerkingarnar um fíggarligu og umsitingarligu avleiðingarnar av uppskotinum.

**Til § 20**

Sum nevnt omanfyri í viðmerkingunum til § 8, verða rættindi og skyldur eftir ásetingunum í uppskotinum knýtt at A-inntøkum og inntøkum av sjálvstøðugari vinnu. Fyri tey, ið hava A-inntøku, verður skipanin eftir uppskotinum tvungin, og hesi hava tær skyldur og tey rættindi, sum ásett eru í hesum lógaruppskotinum. Fyri persónar, sum hava inntøku av sjálvstøðugari vinnu, verður skipanin sjálvboðin.

Inntøkuviðurskiftini hjá teimum sjálvstøðugt vinnurekandi eru so mikið ymisk frá teimum, sum hava lønarinntøkur, at somu reglur viðvíkjandi arbeiðskravi, útrokningargrundarlagi fyri útgjaldi og inngjaldi ikki kunnu nýtast fyri hesar báðar inntøkubólkar.

Tí verður skotið upp, at landsstýrismaðurin fær heimild at áseta í kunngerð reglur fyri sjálvstøðugt vinnurekandi, líkar teimum, sum ásettar eru í hesum lógaruppskotinum.

**Til § 21**

Ásetingin er grundað á, at neyðugt er, at landsstýrismaðurin, til nýtslu í sambandi við útrokning, avgreiðslu av og eftirliti við útgjaldsupphæddum eftir hesi lóg, kann útvega sær upplýsingar frá Toll- og Skattstovu Føroya og frá Landsfólkayvirlitinum, frá Almannastovuni og frá fakfeløgum og arbeiðsgevarum. Ásetingin er sett fyri at hava greiða heimild at krevja upplýsingar.

**Til § 22**

Í hesi áseting eru reglurnar um sivilrættarligu fylgjurnar av at geva skeivar upplýsingar. Hava upplýsingarnar verið orsøk til, at peningur er útgoldin, kann peningurin verða kravdur aftur, um neyðugt við rættaravgerð.

**Til § 23**

Ásetingin er sett fyri at hava greiða heimild at avskriva krøv, tá útlit ikki eru at fáa allan peningin frá skuldaranum.

**Til § 24**

Landsstýrismaðurin fær her heimild at gera sáttmála við onnur lond um tey viðurskifti, sum ásetingarnar í lógaruppskotinum regulera, og í hesum sambandinum at víkja frá ásetingunum

í lógaruppskotinum. Í norðurlendskum høpi verða hesi viðurskiftini reguleráð í konventión frá 15. juni 1992 um sosiala trygd. Sáttmálin er galdandi millum Føroyar og hini norðurlondini, men ikki millum Føroyar og Danmark, har serligar reglur galda.

**Til § 25**

Ætlanin er at leggja umsitingina av skipanini til ALS.
Víst verður til almennu viðmerkingarnar.

**Til § 26.**

Eftir hesi ásetingini kann revsiábyrgd verða áløgd, umframt persónum eisini løgfrøðiligum persónum, heruppií kommunum, landinum og statinum.

**Til § 27**

Ætlanin er, at lógin skal fáa gildi 1. apríl 2001.

**Til § 28**

Persónar, sum fáa útgoldið dagpening í sambandi við barnsburð eftir dagpeningalógini, tá hendan lógin kemur í gildi, fáa útgoldið eftir reglunum í hesum lógaruppskotinum.

Hjáløgd eru innkomin ummæli av lógaruppskotinum.

*1. viðgerð 18. januar 2001. Málið beint í vinnunevndina, sum tann 20. mars 2001 legði fram soljóðandi*

**Á l i t**

Landsstýrið hevur lagt málið fram tann 21. desember 2000, og eftir 1. viðgerð tann 19. januar 2001 er tað beint vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 25. januar, 8., 12., 22. februar, 1., 8., 15., 16. og 19. mars 2001.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Starvsmannafelagið, Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Pedagogfelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Arbeiðsloysisskipanina og við landsstýrismannin í vinnumálum.

Nevndin hevur fingið skriv við viðmerkingum til uppskotið frá Føroya Arbeiðsgevarafelag, dagfest 31. januar 2001, og frá Arbeiðsloysisskipanini, dagfest 12. februar 2001.

Frá Vinnumálastýrinum hevur nevndin fingið hesi skjøl: 1) ummælini, ið Vinnumálastýrið fekk tá uppskotið varð til hoyringar, 2) avrit av notati frá fíggjarmálastýrinum, dagfest 28. desember 2000, um almenna barnsburðargrunnin, 3) avrit av rættleiðing, dagfest 18. januar 2001, ið Fíggjarmálastýrið hevur sent Vinnumálastýrinum og 7-mannabólkinum, 4) skitsu yvir fíggjarligu viðurskiftini, herundir skyldur hjá landinum og arbeiðsgevarum og rættindi hjá løntakarum í sambandi við barnsburð í dag og við grundarlagi í nýggju barsilsskipanini, 5) yvirlit, dagfest 9. januar 2001, yvir fyrisitingarligar ásetingar, sum skulu gerast í sambandi

við uppskotið til løgtingslóg um barsilsskipan, 6) skriv, dagfest 14. februar, við uppskoti til broyting í ígildisásetingini, 7) skriv dagfest 21. februar 2001, við viðmerkingum til viðmerkingar frá Arbeiðsloysisskipanini til uppskotið og 8) skriv dagfest 15. mars 2001, við viðmerkingum til broytingar ið vinnunevndin hevur umhugsa at gera til uppskotið, viðlagt avrit av skrivi frá Arbeiðsloysisskipanini, dagfest 13. mars 2001, serliga viðvíkjandi eftirlønum.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur heitt á nevndina um at gera eina røð av broytingum í lógaruppskotinum, í flestu førum eftir tilmæli frá Arbeiðsloysisskipanini. Nevndin vil skjóta upp, at lógin verður broytt samsvarandi hesum. Landsstýrismaðurin og Arbeiðsloysisskipanin hava tó eisini mælt til at broyta § 13 soleiðis at ásett verður hvussu útgjaldið skal býtast upp á styttri tíðarskeið. Við tilvísingini til § 12 og heimildini í § 14, stk. 2 verður hetta tó ikki mett neyðugt.

Forsætismálaráðið hevur víst á, at bústaðarkravið ið er ein treyt fyri útgjaldið men ikki fyri inngjaldið til skipanina, kann viðføra at føroyingar og danir verða viðgjørdir ymiskt, og sostatt er í stríð við heimastýrislógina § 10, stk. 2. Nevndin hevur eisini umrøtt hendan spurningin, men hevur avgjørt heldur ikki at mæla til broytingar í hesum sambandi, vísandi til, at í tann mun § 17, stk. 3 ikki loysir hendan trupulleikan, so eigur at verða møguligt við millumtjóða avtalum og kunngerðum smb. § 24 at taka hædd fyri hesum.

Í sambandi við viðgerðina hevur nevndin spurgt Almannastovuna, hvussu nógv verða rakt av, at núverandi áseting í dagpeningalógini, ið gevur teimum ið eru heimaarbeiðandi møguleika sjálvboðin at tryggja seg, ikki er tikin við hvørki í nýggju dagpeningalógini ella nýggju barsilsskipanini. Tað hevur ikki borið til at fingið eitt skrivligt svar hesum viðvíkjandi, men nevndin skilir, at tað ikki eru nógv, ið verða rakt av hesum.

**Ein samd nevnd** tekur undir við málinum, men vísandi til omanfyristandandi viðmerkingar mælir nevndin Løgtinginum til at samtykkja uppskotið við hesum

**broytingaruppskoti**

1. Í § 5 verður orðið "skal" broytt til ",eftirlønaraldur, rættindi eftir frítíðarlógini o.o. rættindi skulu".
2. § 9, stk. 1, 3. pkt., verður strikað.
3. Í § 9, stk. 2, 2. pkt. verður aftaná orðið "løn" sett inn orðini "ella hevur søkt um barsilspening frá barsilsskipanini fyri hetta tíðarskeið".
4. § 9, stk. 4, verður strikað.
5. § 10, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Foreldur, sum ættleiða børn, hava rætt til barsilspening, treytað av, at teir myndugleikarnar, sum kanna ættleiðingarmøguleikarnar, hava tikið ta avgerð, at annað ella bæði foreldrini skulu vera heima í sambandi við, at tey fáa barnið."
6. § 10, stk. 3 verður broytt til stk. 2 og orðað soleiðis: "Dagurin, tá tey fáa barnið, verður at javnmeta við føðing, og maður og/ella kvinna, ið ættleiða, verða at javnmeta við ávikavist kvinnu, ið hevur átt og við faðir at barninum." og stk. 4 verður strikað.
7. § 11 verður orðað soleiðis: "§ 11. Lønarútgjaldingar seinastu 2 mánaðirnar, ið eru meira enn 20 % hægri enn meðal inntøkan seinasta árið, verða ikki tiknar við í inntøkugrundarlagið. Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann í heilt serligum førum gera undantak frá ásetingini í stk. 1."

8. Í § 12, stk. 1 verða orðini "íroknað tó dagpening vegna sjúku eftir dagpeningalógini" strikaði, og sett verður inn nýtt pkt. 2, ið verður orðað soleiðis: "Ger viðkomandi av bert partvís at fara frá arbeiðið, verður grundarlagið fyri útrokningini av barsilspeningi lækkað samsvarandi hesum."
9. Í § 15, stk. 1 verður tilvísingin til "§ 12" broytt til "§§ 12 og 13".
10. Í § 15, stk. 2 verða orðini "frítíðarløn og frítíðaríiskoyti" broytt til "til frítíðarløn og frítíðaríiskoyti ið hava samband við farloyvistíðarskeiðið, umframt fyri arbeiðsmarknaðargjøld, ið arbeiðsgevarin rindar í sambandi við farloyvistíðarskeiðið" og tilvísingin til "§ 12" verður broytt til "§§ 12 og 13".
11. Í § 15, stk. 2 verður sum nýtt pkt. 2 sett inn soljóðandi áseting: "Rinda fleiri arbeiðsgevarar løn til sama persón, sum er í barsilsfarloyvi, og røkkur barsilspeningur ikki til fult endurgjald, verður endurgjaldið til hvønn teirra skert eftir nærri reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur".
12. Í § 15, stk. 3 verður aftaná orðið "útgjaldið" sett inn orðini "hvør skal vátta hesar upplýsingar".
13. § 16 verður orðað soleiðis: "§ 16. Tekur persónur nýtt lønandi arbeiði upp í einum tíðarskeiði, tá viðkomandi nýtir rætt sín at fáa barsilspening, skal hann rinda barsilspening aftur fyri teir dagar, hann hevur havt slíkt arbeiði, eisini í teimum førum, har barsilspeningur er útgoldin til arbeiðsgevara jbr. tó stk. 2 og í mun til inntøkuna, viðkomandi hevur vunnið hesar dagar. Stk. 2. Er barsilspeningur útgoldin arbeiðsgevara fyri løn í farloyvistíðini til arbeiðstakara, skal arbeiðsgevarin uttan mun til stk. 1 rinda barsilspening aftur, um viðkomandi arbeiðstakari í sama tíðarskeiði tekur nýtt arbeiði upp hjá hesum arbeiðsgevaranum. Stk. 3. Kravið um afturrindan av barsilspeningi eftir stk. 1 og 2 kann eisini fremjast við at mótrokna møgulig krøv frá arbeiðstakara ella arbeiðsgevara upp á barsilspening, og peningurin kann eisini krevjast inn við at afturhalda í løn og við panting. Stk. 4. Persónur, sum tekur upp nýtt lønandi arbeiði í einum tíðarskeiði, viðkomandi nýtir rætt sín at fáa barsilspening, skal boða umsitingarmyndugleikanum sbr. § 25 frá hesum.", og yvirskriftin til § 11 verður broytt til "Afturrindan".
14. § 18, stk. 1, nr. 2 verður orðað soleiðis: "aðrar skattskyldugar almannaveitingar, tó ikki dagpening eftir dagpeningalógini,".
15. Í § 20, stk. 2 verður aftaná orðini "hvør kann tekna trygging" sett inn orðini "hvørjar inntøkur kunnu tryggjast,".
16. Í § 20 verður tað seinna stk. 2 broytt til stk. 3.
17. Í § 24, stk. 2 verður orðið "nærri" strikað.
18. Í § 27, stk. 1 verður "1. apríl 2001", broytt til "1. juni 2001".
19. Í § 28 verða orðini "hava rætt at fáa" broytt til "fáa útgoldnan"

<u>Viðmerkingar til einstøku broytingarnar:</u>

**Ad. 1:** Sambært viðmerkingunum hjá vinnumálastýrinum, er eitt av endamálunum við lógaruppskotinum, at allir løntakarar í mest møguligan mun fáa endurgjald fyri lønarmiss í sambandi við barnsburð. Skal hetta endamálið verða rokkið er neyðugt eisini at taka rættindi eftir frítíðarlógini við. Við broytingaruppskotinum verður løntakari, ið ikki sambært sáttmála vinnur sær eftirlønaraldur í sambandi við barnsburð, tryggjaður hesi rættindi o.o. rættindi, so sum tað í dag er ásett í Ll. um foreldrafráveru. Viðvíkjandi eftirlønaraldri verður hugsa um tænastumannalíknandi eftirlønir, har sáttmáli ikki ásetur rætt til fráveru og løn í sambandi við barnsburð.

**Ad. 2:** Við nýggju ásetingini í § 11 hevur tilvísingin ikki longur týdning. Víst verður til viðmerkingarnar Ad. 7.

**Ad. 3:** Við broytingini verður staðfest hvør skal taka støðu til spurningin um hvør skal nýta tær 10 vikurnar av farloyvistíðini í § 1, um pápin og mamman ikki eru samd. Við broytingini fær pápin ikki barsilspening um mamman ger av at vera frá arbeiði við løn ella at søkja um barsilspening frá barsilsskipanini fyri hetta tíðarskeið.

**Ad. 4:** Sí ad. 2.

**Ad. 5 og 6:** Við broytingunum verður ættleiðing javnstillað við barnsburð. Við broytingini í stk. 1 verður sostatt møguligt at taka ein part av farloyvistíðarskeiðnum áðrenn móttøkudagin av barninum, vísandi til at tað er vanligt at ein skal eftir børnum úr útlandinum. Harumframt kunnu ættleiðingarforeldirni við broytingini í stk. 2 eisini partvís hava frí samstundis. Viðvíkjandi stk. 4 verður víst til viðmerkingarnar ad. 2.

**Ad. 7:** Ætlanin við ásetingini er at fyribyrgja, at arbeiðsgevari, ið kann hugsast at hava ein áhuga í at tryggja einum persóni rætt til barsilspening, setir viðkomandi í starv ella í hægri lønt starv beint undan barnsburði soleiðis, at viðkomandi fær upparbeitt sær rætt til eina veiting ella eina hægri veiting frá barsilsskipanini, enn persónurin annars vildi fingið. Ásannandi, at ásetingin kann hava við sær, at eisini onnur missa rætt til barsilspening, enn tey, ætlanin var, at ásetingin skuldi fevna um, verður givin landsstýrismanninum heimild til í heilt serligum førum at gera undantak frá ásetingini í stk. 1. Tá sagt verður lønarútgjaldingar, verður hugsað um einstakar lønarútgjaldingar, men um tað klárt sæst at ein arbeiðsgevari við vilja hevur roynt at býtt upphæddir, ið annars høvdu verið fevndar av ásetingini yvir fleiri lønarútgjaldingar, so er ásetingin ikki til hindurs fyri, at fleiri lønarútgjaldingar kunnu verða lagdar saman og harvið verða fevndar av 20%-kravinum.

**Ad. 8:** Dagpeningur vegna sjúku eftir dagpeningalógini verður ikki nevndur í broyttu orðingini, men við broytingini ad. 12, verður dagpeningurin partur av grundarlagnum fyri bæði inngjaldið og útgjaldið. Við nýggju ásetingini í pkt. 2 verður staðfest, at persónur ikki noyðist at fara frá øllum arbeiðið ið viðkomandi røkir fyri at fáa barsilspening. Hevur ein persónur t.d. fleiri størv ella ynskir viðkomandi at røkja eitt starv niðursetta tíð t.d. ein part av tíðarskeiðnum, so skal barsilsskipanin ikki verða til hindurs fyri hesum. Tó eigur eitt inntøkugrundarlag frá einum starvið ið viðkomandi heldur fram í, tá ikki at teljast við í grundarlagnum fyri útrokningini av barsilspeninginum.

**Ad. 9:** Gjaldið til arbeiðsgevaran eigur eisini at verða avmarkað við loftinum í § 13.

**Ad. 10:** Við broytingini verður ásett at arbeiðsgevarin, í tann mun tað liggur innanfyri hámarksútgjaldið, eisini skal hava arbeiðsmarknaðargjøld endurrindaði. Harumframt er ásetingin orðað eitt sindur greiðari. Eisini er gjørd ein teknisk broyting.

**Ad. 11:** Við ásetingini í pkt. 2 fær landsstýrismaðurin heimild til at áseta reglur, ið skulu loysa trupulleikar, ið kunnu uppstanda um løntakarin hevur fleiri arbeiðsgevarir. Broytingin í pkt. 2 er gjørd eftir tilmæli frá landsstýrismanninum og Arbeiðsloysisskipanini.

**Ad. 12:** Við broytingini fær landsstýrismaðurin eisini heimild til at áseta reglur um váttan av upplýsingum, ið arbeiðsgevarin skal lata í sambandi við at honum verður veitt útgjald. Broytingin er gjørd eftir tilmæli frá landsstýrismanninum og Arbeiðsloysisskipanini.

**Ad. 13:** Tað er ikki ætlanin við skipanini, at arbeiðstakari skal kunna nýta farloyvi sum høvi til at vinna sær eyka inntøkur. Um farloyvistíðin verður nýtt til at røkja annað lønandi arbeiði, meðan viðkomandi fær barsilspening frá skipanini, skal barsilspeningur í mun til inntøkuna krevjast aftur frá viðkomandi. Víst verður annars til viðmerkingarnar undir ad. 8. Um viðkomandi hinvegin fráboðar umsitingarmyndugleikanum sbr. § 25, at hann partvís tekur arbeiðið uppaftur, hevur tað bara týdning fyri, hvussu grundarlagið fyri tí framhaldandi barsilspeninginum verður roknað út.

**Ad 14:** Víst verður til viðmerkingarnar undir ad. 8.

**Ad. 15:** Við broytingini fær landsstýrismaðurin eisini heimild til at áseta reglur um hvørjar inntøkur kunnu tryggjast eftir reglunum um sjálvbodna trygging. Broytingin er gjørd eftir tilmæli frá landsstýrismanninum og Arbeiðsloysisskipanini.

**Ad. 16:** Teknisk broyting.

**Ad. 17:** Við broytingini verður ein mótsøgn í ásetingini tikin burtur.

**Ad. 18:** Við broytingini verður ígildissetanin av lógini flutt til 1. juni 2001. Broytingin er gjørd eftir tilmæli frá landsstýrismanninum.

**Ad. 19:** Við hesi orðingini verður samsvar millum viðmerkingarnar hjá vinnumálastýrinum til § 28 og sjálva ásetingina í hesi grein. Broytingin er gjørd eftir tilmæli frá landsstýrismanninum og Arbeiðsloysisskipanini.

Ein **minniluti í nevndini** (Henrik Old) viðmerkir tó harumframt, at tá ein nýggj skipan verður sett á stovn, so kann tað ikki vera ein náttúrulóg at umsitingin skal liggja í Havn og minnilutin mælir tí Løgtinginum til harumframt at samtykkja uppskotið við hesum

**broytingaruppskoti**

§ 25, stk. 1, 2. pkt. verður orðað soleiðis: "Umsitingin av barsilsskipanini skal liggja í Suðuroynni" og pkt. 2 verður hereftir pkt. 3.

*2. viðgerð 23. mars 2001. Uppskot frá Finni Helmsdal um at beina málið aftur í nevnd fall 12-0-16. Broytingaruppskot frá Henrik Old til § 25 fall 12-3-13. Broytingaruppskot frá vinnunevndini til §§ 5, 9, 10, 11, 12, 15, 16, 18, 20, 24, 27 og 28 samtykt 23-4-1. Uppskotið soleiðis broytt samtykt 23-4-1. Uppskotið fer soleiðis samtykt til 3. viðgerð.*

*Á tingfundi 27. mars løgdu tingmenninir Heini O. Heinesen, Alfred Olsen, Jógvan á Lakjuni, Jákup Suni Joensen, Henrik Old, Dan R. Petersen og Kári P. Højgaard fram soljóðandi*

**B r o y t i n g a r u p p s k o t**

**til**

**3. viðgerð**

1. Í § 12, stk. 1, verður sett inn nýtt pkt. 2, ið verður soljóðandi: "Hægsta móttikna miðal mánaðarliga gjaldskylduga A-inntøkan eftir § 18 í einum samanhangandi 6 mánaða

skeiði innan fyri seinastu 12 mánaðirnar áðrenn fráveruna verður tó nýtt sum grundarlag, um hendan er hægri enn inntøkan sambært 1. pkt." og 2. pkt. verður hereftir 3. pkt.
2. Í § 12, stk. 2, verður tilvísingin til "stk. 1" broytt til "stk. 1, 1. pkt.", og aftaná orðini "hetta styttra tíðarskeiðið" verða sett inn orðini ",jbr. tó stk. 1, 2. pkt.".

Viðmerking:

Við nýggju ásetingini í pkt. 2 skulu teir bestu 6 mánaðirnir innan fyri seinastu 12 mánaðirnar áðrenn fráveruna nýtast sum grundarlag fyri útrokningini av barsilspeninginum, um A-inntøkan fyri hetta tíðarskeiðið er hægri enn sæmbært 1. pkt. Hervið verða atlit serliga tikin til tey arbeiðspláss, har tað javnan kemur fyri, at einki arbeiði er í longri tíðarskeið. Sostatt verður tikin hædd fyri, at tímalønt arbeiðsfólk, ið hava óstøðugt arbeiði, kunnu vera verri fyri enn tey, ið hava støðugt arbeiði.

*Á sama tingfundi løgdu tingmenninir Hans Pauli Strøm, Finnur Helmsdal, Kristian Magnussen og Jóannes Eidesgaard fram soljóðandi*

**B r o y t i n g a r u p p s k o t**

**til**

**3. viðgerð**

§ 12, stk. 1, 1. pkt., verður orðað soleiðis:
Grundarlagið fyri útrokningini av barsilspeningi er hægsta miðal móttikna gjaldskylduga A-inntøkan eftir § 18 í 8 samanhangandi vikur seinastu 12 mánaðirnar áðrenn fráveru.

**Viðmerkingar**

Av tí at serliga tímaløntir løntakarar kunnu hava sera óstøðugt arbeiði, er tað ikki heppið fyri hesar, at útrokningargrundarlagið fyri barsilspeningi er miðalinntøkan alt 12-mánaðaskeiðið undan fráveruni. Tí verður skotið upp, at tær 8 samanhangandi vikurnar í 12-mánaðaskeiðinum við tí størstu inntøkuni verður brúkt sum útrokningargrundarlag.

*Á sama tingfundi løgdu tingmenninir Finnur Helmsdal, Hans Pauli Strøm, Annita á Fríðriksmørk og Kristian Magnussen fram soljóðandi*

**B r o y t i n g a r u p p s k o t**

**til**

**3. viðgerð**

1. Í § 12, stk. 1, 1. pkt. verður framman fyri orðið "móttikna" sett inn orðini "tann av viðkomandi".
2. Í § 12, stk. 2, verða orðini "miðal móttiknu gjaldsskyldugu A-inntøkuni eftir § 18" broytt til "miðal gjaldskyldugu A-inntøkuni eftir § 18, ið viðkomandi hevur móttikið".
3. § 17, stk. 2, verður orðað soleiðis: "Stk. 2. Gjaldskyldug smbrt. stk. 1 eru øll, sum rinda A- inntøku í Føroyum.", og stk. 3 og 4 verða strikað.

4. Í § 18, stk. 1, 1. pkt., verða orðini "fáa ella" strikað.
5. § 19, stk. 1, verður "0,25%" broytt til "0,5%"
6. Í § 19, stk. 2, verða orðini "ella fáa" strikað.
7. Í § 19, stk. 4, verða "0,25%" broytt til "0,5%"

**Viðmerkingar:**

Tá dagpeningalógin kom í 1978, varð samstundis lógarfest, at allar kvinnur á arbeiðsmarknaðinum høvdu rætt til løn í sambandi við barsil. Samstundis merkti tað, at arbeiðsgevarar, almennir sum privatir, skuldu gjalda fyri barsil, um ikki hetta varð goldið av dagpeningaskipanini.

Ein trupulleiki við hesi skipan hevur verið, at bara arbeiðsgevarar, sum hava kvinnur í starvi, hava borið hesa útreiðslu.

Lógin um barsilsskipan javnsetir allar arbeiðsgevarar, og er tað sum tað skal vera.

Lógin um barsilsskipan áleggur samstundis lønmóttakarum eisini at gjalda sín part av hesum útreiðslunum, og er tað als ikki, sum tað eigur at vera. Við at áleggja lønmóttakarum at gjalda fyri barsil, áleggur lógin samstundis lønmóttakarum at gjalda fyri rættindi, sum av fyrstan tíð vórðu vunnin longu í 1950'unum. Uppskotstillararnir fegnast um teir fyrimunir, sum lógin gevur kvinnum á arbeiðsmarknaðinum, men heldur hesar fyrimunir vera ov dýrt keyptar, um teir skulu gjaldast við rættindum, sum vóru vunnin fyri góðum 40 árum síðani.

Uppskotsstillararnir eru eisini av teirri fatan, at flestu arbeiðsgevarar eru førir fyri at gjalda hesa útreiðslu, m.a. tí Løgtingið fyri stuttum lækkaði partafelagsskattin úr 27% niður í 20%.

*3. viðgerð 27. mars 2001. Broytingaruppskot frá Hans Paula Strøm, Finni Helmsdal, Kristian Magnussen og Jóannes Eidesgaard til § 12 fall 7-0-21. Broytingaruppskot frá Finni Helmsdal, Hans Paula Strøm, Annitu á Fríðriksmørk og Kristian Magnussen til §§ 12, 17, 18 og 19 fall 11-4-14. Broytingaruppskot frá Heina O. Heinesen, Alfred Olsen, Jógvan á Lakjuni, Jákup Suna Joensen, Henrik Old, Dan R. Petersen og Kára P. Højgaard til § 12 samtykt 29-0-0. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð og soleiðis broytt við 3. viðgerð, endaliga samtykt 29-0-0. Málið avgreitt.*

*Ll. nr. 48 frá 03.04.2001*
*J.nr. 524-0036/2000*